


# Fólkatingið vitjaði føroysku oljuhavnina

Deil:

**Jan Müller**

14.08.2014 - 21:28

Oljan.fo

Mikudagin hevði Føroyanevndin í Fólkatinginum høvi at vitja føroysku oljuútgerðarhavnina í Runavík. Hetta hendi um somu tíð sum arbeitt varð í havnini at veita vørur og tænastur til boringina á landgrunninum. Fólkatingslimirnir sóu útgerðarhavnina og fingu eisini eina sera gjølliga frágreiðing um arbeiðið í Atlantic Supply Base. Stjórin Eli Lassen greiddi livandi frá virkseminum og eisini um framtíðarvánirnar hjá felagnum og eisini um útlitinini hjá oljuvinnuni í Føroyum sum heild. Eisini nevndarformaðurin í ASB, Olaf Olsen tók ímóti gestunum.

Danska oljufelagið DONG, sum sjálvandi hevði stóra áhugan hjá donsku fólkatingslimunum, er millum feløgini, ið bora á landgrunninum. Felagið fekk í fjør tvey nýggj leitiloyvi, har felagið er fyristøðufelag. Hetta er í tí sokallaða "Gullhorninum", har

DONG í 2001 varð við til at gera fyrsta oljufundið í Føroyum, tó at hetta ikki var mett lønandi. Nú hevur danska felagið so sett sær fyri aftur at varpa ljós á sama økið.

Undan vitjanini í Runavik hevði Ben Arabo, stjóri og formaður í FOIB, áhugafelagið hjá oljufeløgunum við leitiloyvi, hildið framløgu fyri donsku gestunum, har hann greiddi frá oljuvinnu í altjóða høpi og frá gongdini í Føroyum á hesum øki.

Í Føroyanevndini eru eisini báðir føroysku fólkatingsmenninir, Sjúrður Skaale og Edmund Joensen. Sjúrður Skaale er formaður í nevndini.

Myndir: Sjúrður Skaale

